# Á dett vælsignaða hol



CAUSERÍ

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í dag er mikudagur og eg siti og hugsi um, hvat eg skal gera. Tað stendur eitt sindur fast við tí, sum eg dagliga takist við, og eg kundi altíð koyrt ein túr vestur á flogvøllin, tað tekur bara eina lítla løtu, nú aftan á at undirsjóvartunnilin lat upp í gjár. Men so hugsi eg, mark má tá vera fyri heimføðisskapi. Eg var jú heilar tveir túrar í gjár í Vágum, so ofta havi eg ongantíð verið fyrr, síðan eg fyrstu ferð var í Vágum á eini Vestanstevnu fyri 30 árum síðani. Og hon var hildin í Sørvági. Vit búðu í telti og vóru vátir bæði innan og uttan.

Tvær reisur vesturi í Vágum ein dag, av berum forvitni og ongum øðrum. Týsdagurin 10. desember gjørdist, uttan at eg hevði grunað tað frammanundan, ein stórur dagur í mínum lívi. Ein dagur við spenningi, ein dagur, har eg var errin av landinum, eg búgvi í og tí vælstandi her er.

Men also tvær reisur í Vágum ein dag. Álvaratos.

Tað heila byrjaði so óskyldugt. Týsdagurin vaknaði akkurát sum allir aðrir týsdagar, og hann er jú linur hesa ársins tíð, so sól sá tú onga fyrr enn út móti middegi. Bilurin stóð pakkaður, eg hevði avtalur norðanfyri í samband við tað arbeiði, eg geri nú, men har kom okkurt í vegin, og so verður tað ikki av nøkrum fyrr enn í næstu viku.

Útvarpið um middagsleitið vakti undirsjóvarstunnilsspenningin í mær. Framman undan høvdu tankarnir verið 60 ár aftur í tíðini, afturi við krígsbyrjan og hjá nøkrum manningarlistum, sum ein troyttur sýslumaður hevði skrivað, helst á náttartíð og so óskilliga, at teir næstan vóru ólesiligir.

Men fepurin undir Vestmannasundi dró meg fram í nútíðina. Tað var røddin á Dánjal Højgaard, útvarpsmanni, sum var staddur umborð á seinasta túri Ternunar, ið rættuliga vaktu kenslur í mær. Týðuliga rørdur ljóðaði hann á málinum, ella var nú tað vánaliga telesambandið, broytti røddina, greiddi hann frá hesum allarseinasta túri. Teir høvdu longu loyst úr Vestmanna, og eg ergraði meg, at eg ikki hoyrdi byrjanina av innslagnum, tá teir tveir Deutzmotorarnir á Ternuni sleptu teimum 740 hestunum leysum á hesi seinastu ferðini og bjóðaðu eystfallinum í Vestmannasundi av. Ternan er 22 og motorarnir eru bara tvey ára gamlir, hvat skulu teir nú nýtast til?

Vit eru nostalgisk, føroyingar eru afturtráandi, vit leingjast eftir farnum tíðum. Ongantíð aftur um Vestmannasund. Og vit eru afturtráandi, hóast tey vaksnu alt mítt lív hava fortalt mær, hvussu nógv verri ella betri alt var fyrr, alt eftir hvussu tað passar inn í tað tey vilja siga, við tí eina endamáli at fáa meg at ásanna, at eg skal ikki halda meg vera nakað sum helst. Ongantíð aftur um hetta stórbara sund, hesin ólukku undirsjóvartunnilin, eg gerist heilt tungur í huga. Men so komi eg at hugsa um, hvussu irriterandi hetta sjóvegis samband mangan hevur verið. Havi staðið og trippað á Oyragjógv, spentur at koma heim og tað gekk ikki fyri seið hjá ferjuni at koma um Sundið. Hon kom bara ikki undan Egilsnesi, eg haldi tað eitur soleiðis, eri ikki staðkendur, so haldi mær til góðar. Nú hevur tað verið so flott seinastu árini, at eitt ordiligt skip hevur siglt um sundið, men áðrenn, við opna Sam, tað var ikki bara gamansleikur. At skotra seg millum skitnar bilar, niður í alt ov trong uppihaldsrúm, har tú onkuntíð var tvangsinnlagdur at sita millum fyrilitarleysar roykjarar og anda ball niður í teg.

Og so koma tær stórbæru løturnar fram fyri meg, ferðirnar um Sundið, tá heimurin lá víðopin fyri meg. Ferðirnar niður lestrarárini, ferðirnar út í heim sum fjølmiðlamaður, ferðirnar at halda frí. Og meðan eg smílist í hesum sælu minnum, sníkir knappliga eitt døkkari minni fram í huganum. Tað var á Vestmannakaj við ferjuleguna, júst í land komin av Ternuni, eftir ár í útlandinum, at eg sá pápa fyri fyrstu ferð, eftir at hann var vorðin sjúkur. Hann var sum eitt hím, og eg visti beinanvegin, at eg átti hann ikki leingi afturat. Hann doyði stutt eftir. Tey flestu munnu hava fjálg og kaldligari minnir um Vestmannasund.

Og so tendraði eg sjónvarpið og fekk svanatúrin hjá Ternuni einaferð afturat við myndum og tí heila. Burtursæð frá konuni, so komi eg ikki so nær nøkrum øðrum persóni í verðini enn toftamanninum Tóra í sjónvarpinum. Og makan til sorgblídni skal mann leita leingi eftir. Har sótu vágafólk við tárum í eygum, fólk, sum vit einki annað hava hoyrt frá enn grenj yvir vánaliga sambandið um sundið. Tey vóru møtt mannsterk fyri at sleppa at við hendan seinasta túrin. Var hetta reint sjálvpínarí, ella ramasta álvara? Og onkur vágamaður var vorðin so góður við stamborðið umborð í Ternuni, hann í ramasta álvara ætlaði at fáa borðið í land og harvið gera seg inn á landsins ognir. Tí hvussu hann ætlaði at fáa borðið í land, meldaði søgan einki um.

Eg seti meg aftur á í lenistólinum at fylgja við beinleiðis reportasjuni. Sleppi øllum sum eitur søguligum journalistikki, eri aftur í nútíðini, og farið ótilvitað til arbeiðis aftur sum journalistur. Sjónvarpsmenninir eru væl fyrireikaðir og eg føli við teimum, tá teknikkurin svíkir. Eitt nú síggja vit í nakkan á eini vágakvinnu, sum heldur røðu og tað gongur leingi, áðrenn ein kameramaður gerst varugur við hetta og fyllir hana út á sjónvarpsskíggjan frá rættari síðu.

Og so síggja vit Marius Dam, løgtingsmann, ovurfegnan á motorsúklu, sum ein av teimum fyrstu gjøgnum tunnilin. Hann hevur verið av ídnastu stríðsmonnum fyri at vágamenn skulu sleppa undan at gjalda fyri at koyra undir Sundinum. Hendan dystin tapti hann, men hann er ikki ráðaleysur. Hevur hann hug, so sleppur hann ókeypis undir Sundið. Motorsúkklur skulu ikki gjalda bummpengar, og tað hjálpir so vælsignað og væl til í húsarhaldinum, hvør spardur túrur, og hetta hóast ein er fulltíðar kommunulækni og fulltíðar tingmaður og hevur eina inntøku langt omanfyri 100.000 krónur um mánaðin. Mange bække små, ella alt ger mun, sum sambandsmenn plaga at taka til. Eg verði drigin við í showið og kenni meg næstan líka, sum tá vegurin kom til Oyndarfjarðar fyri 34 árum síðan.

Eg má vestur og tað beinanvegin. Yngri sonurin kom við.

Inni í Kalbaksbotni skýmir og halin av bilum suðurgangandi og norðurgangandi strekkir seg sum ein jólaketa heilt niðan í tunnilsmunnan. Hetta er myrkasta vegastrekkið í heiminum, og nú Havnin er komin upp í Kollafjørð, skuldi tað ikki undrað, um teir ikki fara lýsa hetta vandamikla strekkið við gøtuljósum.

Tað er ikki bara eg sum havi fingið hugskotið at koyra undir Vestmannasund. Frammanfyri mær er ein eldri kvinna, sum antin hevur júst hevur fingið koyrikoyrt, ella er ein sum hevur sett sær fyri at koyra so spakuliga, at ein konstantur streymur av yvirhálandi bilum koyra fram um hana. Hon er týðuliga skelkað av hesum eirindaleysu fartdjevlunum og eg síggi, hvussu hon skákar við høvdinum og skeldar. Og hon hevur so ilt við at halda seg sínumegin miðlinjuna og eg tori ikki at yvirhála. Eg hugsi, at hóast hon í bestu meining ikki vil koyra skjótari enn 60, so setur hon nógv onnur í ferðsluni í beinleiðis vága, tí slík spøk ferð gevur nógvar óneyðugar yvirhálingar. Hon veit tað bara ikki, ger alt í bestu meining, hugsar, at tað eru hini, sum ikki duga sær hógv í ferðsluni, royni eg at ugga meg sjálvan við, so eg ikki eisini loypi fram av í sinni.

Kvinnan fór tíbetur ikki í Undirsjóvartunnilin. Hon blunkaði til høgru í rundkoyringini í Kollfjarðardali og tað lætnaði fyri framman. Men bert eina lítla løtu, tí úr Kollafirði kemur bilur ið hevur skund. Hann steðgar slett ikki á, men koyrir beint út um hávatanngarðin, og vit mundu brostið saman. Ein ordiligur: Her komi eg! Eg hvakk við, spurdi meg sjálvan, hví eg absolutt skuldi vestur nú øll skuldu tað sama. Undirsjóvartunninlin verður væl opin í framtíðini eisini, ikki bara í dag.

Miðskeiðis í Leynatunnlinum rendu vit okkum í eina bíðirøð av bilum. Hetta kom so knappliga á, at eg kláraði akkurát at steðga, áðrenn eg bresti í bilin, sum var frammanfyri, tann reyði, sum mundi rent á meg í rundkoyringini. Teir aftanfyri vóru ikki so hepnir. Ein øgiligur brestur og bilar stoyttu saman. Onkur mátti koyra út í mótsætta síðu, fyri ikki at renna í tann sum var fyri framman. Og lukkutíð var ongin mótgangandi hesa løtuna, øll vildu vestur. Eg hevði upplivað fyrsta ferðsluóhappið síðan undirsjóvartunnilin lat upp og tað var ikki eingang í honum. Frætti aftaná, at tann eini bilurin var so illa farin, at brandbilur mátti koma eftir honum. Eitt sindur óttafullur hugsaði eg eisini um eld, nú vit stóðu fastir inni í tunnlinum. Tað hevði ikki verið meira enn næstbest, fóru besintangar at bresta, nú hesin stutti tunnil var fullur av bensinbilum. Og hvussu við tilbúgvingini, um slíkt skuldi borið á.

So eru vit inni í tunnlinum. Tí nýggja also. Eitt fantastiskt fornemmilsi. Við beinari leið undir Kvívík, niður í undirgrundina, undir sundið, nakað sum okkara forfedrar ikki í sínum villasta fantasi kundu hugsað sær var møguligt. Hann er víður, turrur, nossligur, snøgt sprongdur, behagiligur og deiligur. Hetta er nakað av tí og eg eri so ovurfegin. So nógv ferðsla, sum í dag, verður ikki í framtíðini.

Vit koma uppaftur turrskøddir og koyra á Vágalandinum, meðan mánin júst er komin upp um Malingstind fyri vestan, og sum vit síggja silouettirnar av og eg skilji Jens Paula, tá hann við skaldaorðum lýsir hetta prúða og vakra fjall. Og eg síggi bara ranguna av tí nú.

Og hvat nú, ein er komin vestur. Sosialurin hevur latið upp blaðstovu í Sandavági, so hví ikki hyggja inn á gólvið. Sum sagt so gjørt og løtu seinni vóru vit aftur undir Sundinum og eg hugsaði um vestfallið mundi hoyrast, um ein fór út og lurtaði ordiliga.

Nakrar tímar seinni var eg aftur nakrar metrar frá rundkoyringini í Kollfjarðardali, hevði verið norðanfyri eftir ketilosti frá Líggjas bónda á Húsgarði, bónda í Syrðugøtu, sum hevur fenaðin Millum Fjarða —Tunnilin var nú lekkur at koyra í, og áðrenn eg visti av var eg aftur undir Sundinum og sá, Vágamegin, Skælingsfjall dusa sær mektugt í mánalýsinum

Eg havi enn ikki verið í Vágum í dag.